# Grind legði beinini í Klaksvík

**Tað var ein vøkur sjón, tá bátarnir stevndu inn eftir vánni í Klaksvík fyrrakvøldið. Veðrið var av tí allarfagrasta. So nógvur bátur hevur sjáldan ella ongantíð verið at sæð í einum grindadrápi á Klaksvík áður**

GRINDADRÁP
*Rúna Sivertsen*

Seinnapartin fyrradagin fann ein bátur eina grind nakað vestan fyri Kallin. Grindin varð rikin á Klaksvíkina, har hon varð hildin til um gott níggjutíðina. Hetta var ein lítil grind, ið taldi 48 hval. Drápið gekst væl; tað tók bara ein lítlan hálvan tíma, til grindin var deyð. Seðlarnir komu út klokkan 6 gjáramorgunin.

Á politistøðini siga teir, at menn møttu væl upp, og at teir sjáldan hava sæð so nógvan bát í einum grindadrápi á Klaksvíkini. Staðið, har grindin varð funnin, gjørdi eisini sítt til, at bátar komu úr øllum ættum.

Grindin varð býtt millum bátarnar og fólki á landi. Í drápinum vóru 98 bátar og 453 mans; teir fingu eitt hálvt skinn í part. Á landi vóru 190 mans, sum fingu fjórðings skinn í part.

Eingin grind legði beinini í Klaksvík í fjør, og menn vóru grammir eftir at fáa part.



*98 bátar og í alt 643 mans vóru við í grindadrápinum á Klaksvík fyrrakvøldið.*



*Onkur hevði á munni, at annar hesin hvalurin ikki var deyður, tá farið var frá honum. Grindadrápið hevur verið fyri ágangi uttaneftir; tí er umráðandi hjá okkum at fara væl um. Tað hoyrir ongastaðni heima, at ein og hvør skal kunna skera hval á háls.*

# Eldur í Grønanesi

**Vestmannatrolarin Grønanes fekk stóran skaða, tá eldur var í maskinrúminum hósdagin. Eingin mansskaði varð**

ELDUR UMBORÐ
*Edvard Joensen*

Eldur kom í maskinrúmið á vestmannatrolaranum Grønanesi, tá hann var á veg heim úr Skagen, har skipið hevur fingið stóra umvæling.

Tað var fyrrapartin hósdagin, at ein ógvuslig spreinging var í maskinrúminum, sum beinanveg stóð í ljósum loga, og nógvur roykur var um alt skipið, greiðir Pauli Poulsen, skipari á Grønanesi, frá.

Teir vóru á veg til Føroya úr Skagen og vóru staddir einar 12 fjórðingar úr Egersund í Noreg, tá eldur kom í.

MRCC fráboðan var beinanveg send, men hon virkaði syndarliga illa, sigur Pauli Poulsen. Ikki fyrr enn ein hálvan tíma seinni ringdi ein norsk støð aftur og spurdi, um nakað feilti umborð. Og tað gingu fýra tímar, til hjálparskip kom til teirra. Men tá vóru teir sjálvir lidnir at sløkkja eldin. Pauli Poulsen sigur, at hann kallaði eisini á Tórshavn Radio, sum tó hoyrdi teir sera illa.

Tá eldurin var kyknaður, varð maskinrúmið beinanveg læst av, og halonanleggið sett í gongd. Tað sløkti tað mesta av eldinum, men ikki var hugsandi at koma til fyri hita.

Tá eldurin var minkaður munandi, fóru tveir mans niður í maskinrúmið at sløkkja tað seinasta við eldsløkkjarum.

–Tað var rættiliga vandamikið, tí eingin roykkavaraútgerð var umborð, og halonanleggið hevði verið í gongd. Seinni hava vit so merkt tað aftur, sigur Pauli Poulsen. Teir hava kent seg illa, og bæði spýð og latið av hinum endanum.

–Tað er heilt vist, at vit loysa ikki aftur, uttan roykkavarútgerð er umborð, sigur hann heilt avgjørdur.

Grønanes liggur nú í Egersund, og tryggingin er við at taka støðu til, hvat gerast skal við skipið. Maskinrúmið hevur fingið stóran skaða. Høvuðsmotorurin er nakað skaddur, meðan allir kaðalar og rør eru brend av í hitanum.

Norðmenn, sum vóru umborð og hugdu at skaðanum, meta, at tað fer í minsta at taka einar tríggjar vikur lagi at gera aftur. Umframt kemur so, at alt skipið, sum tað er, er svart av royki, sigur Pauli Poulsen.

Talan var um ein retur til høvuðsmaskinuna, sum lak olju niður á eitt útsoytsrør. Oljan gjørdist heit, og eldur kom í, er staðfest, sigur Pauli Poulsen.

Teir vóru fýra mans við, tá skaðin hendi.

## Norðurlendskur skattafundur í Føroyum

NORRØNT SAMSTARV
*Tíðindaskriv*

Tann á árligi fundurin um norðurlendsku tvískattaavtaluna verður í ár hildin í Føroyum.

Á fundinum, sum verður í dag, mikudagin, og hósdagin á Hotel Føroyum, fara umboð fyri fíggjarmálaráðini og skattamyndugleikarnar úr norðurlondunum at viðgera aktuellar norðurlendskar og altjóða skattaspurningar.

Øll norðurlond uttan Grønland eru limir í norðurlendsku tvískattaavtaluni, har Føroyar hava sjálvstøðugan limaskap.

Norðurlendska tvískattaavtalan, sum av fyrstan tíð kom í lag í 1989, er ein av teimum heilt fáu altjóða tvískattaavtalunum, ið er millum fleiri enn tvey lond. Vanligast er, at tvey lond gera tvískattaavtalur, men tann norðurlendska avtalan er gjørd millum seks lond.

Norðurlendski skattafundurin er á embætismannastigi, og tað eru Fíggjarmálaráðið og Toll- og skattstova Føroya, sum skipa fyri fundinum.




*Grønanes er júst komin frá umvæling og sandblásing, men kann nú vænta at enda aftur á skipasmiðju í minsta lagi í tríggjar vikur*



UTTAN ÚR HEIMI

# SEINASTA VITJANIN



*Í Krakow vóru 2,7 milliónir fólk komin at lýða á pávan, tá hann helt messu har sunnudagin. Pávin, sum upprunaliga æt Karol Wojtyla, er ættaður úr Krakow*

**Fyri 9. og uttan iva seinastu ferð hevur Jóhannes Páll pávi Annar vitjað heimbýin Krakow. Har mælti hann pólendingum til at fara upp í ES**

PÁVAVITJAN
*Árni Joensen:*

Mánadgin endaði Jóhannes Páll pávi sína 9. og uttan iva seinastu vitjan í gamla heimbýi sínum Krakow í Pólandi.

Áðrenn hann fór aftur til Rom, vitjaði pávin tað gamla kleystrið uttan fyri Krakow, har umleið 18.000 fólk vóru komin saman at hoyra pávan og at heiðra gestin á seinastu vitjan hansara.

Í messuni nýtti Jóhannes Páll Annar høvi til at ugga tey fátæku og tey arbeiðsleysu í einum landi, sum hevur álvarssamar búskapartrupulleikar at dragast við. Fyri teimum flestu er limaskapur í ES loysnin á trupulleikunum, og tí venda nógvir pólendingar eygunum vestureftir í hesum døgum.

Pólendingar skulu á fólkaatkvøðu um ES-limaskapin, men teir fingu eingi ráð frá pávanum um, hvussu teir skulu atkvøða. Men aftaná greiddi vertur pávans, kardinalurin í Krakow, frá, at at pávin hevði biðið seg og onnur ansa eftir, hvussu ES verður lagað í framtíðini, soleiðis at øll mannarættindi verða vird.

Polski forsætisráðharrin, Leazek Miller, hitti eisini pávan, og aftaná segði hann, at pávin hevði víst stóran áhuga fyri polsku ætlanini at fara upp í ES, og sambært Miller var tað týðiligt, at pávin mælti pólendingum til at fara uppí.

Flest allir pólendingar munnu kenna seg vísar í, at hetta var seinastu ferð, at Jóhannes Páll pávi Annar vitjar heimlandið. Tað var helst eisini orsøkin til, at so mong vóru og lurtaðu eftir honum. Hildið verður, at tá pávin helt messu í Krakow sunnudagin, vóru umleið 2,7 milliónir fólk og lýddu á.

Tann 82 ára gamli Jóhannes Páll, sum hevur verið pávi síðani 1979, er ógvuliga heilsuveikur.

# Fólk í skúlaverkinum skulu kannast betur

**Eftir morðini í Soham krevja bretsku bløðini, at fólk, sum fáa arbeiði innan skúlaverkið, skulu kannast betur, enn gjørt verður**

SOHAM-MORÐINI
*Árni Joensen:*

Hóast bretska løgreglan ikki hevur ákært tann 28 ára gamla Ian Huntley og ta 25 ára gomlu Maxine Carr fyri at hava beint fyri teimum báðum tíggju ára gomlu gentunum Jessicu Chapman og Holly Wells, tykjast flestu bretsku fjølmiðlarnir halda, at tey eru sek.

At tey bæði arbeiddu í skúlanum, sum tær báðar genturnar gingu í, hevur fingið fjølmiðlarnar at reisa spurningin, hvussu væl skúlamyndugleikarnir kanna fortíðina hjá fólki, sum fáa starv í skúlaverkinum. Ian Huntley hevur framvegis starv sum skúlatænari í skúlanum, og Maxine Carr var til fyri fáum mánaðum síðani hjálparlærari í flokkinum, sum tær báðar genturnar gingu í.

Enn hava hvørki myndugleikarnir ella fjølmiðlarnir sagt nakað um, at tey bæði hava eina ivingasama fortíð, men spurningurin er heldur, hvussu væl skúlamyndugleikarnir í Soham kannaðu hesi viðurskiftini, áðrenn teir settu tey bæði í starv. At fjølmiðlarnir hava reist spurningin hevur higartil havt við sær, at landsmyndugleikarnir hava biðið um alt tilfar í málinum so sum samskiftið millum løgregluna í Cambridgeshire og skúlamyndugleikarnar í Soham.

Blaðið The Times skrivaði í gjár, at skuldi tað víst seg, at okkurt mistak er gjørt, kann eingin ivi vera um, at verandi lóggáva á økinum má herðast.

Eitt annað blað, The Guardian, visti í gjár at siga, at tann skrivstovan, sum kannar fortíðina hjá eitt nú skúlalærarum, er fleiri vikur afturút í sínum arbeiði. Tað ger sambært blaðnum, at fólk við einari ivingasamari fortíð kunnu byrja sum lærarar nú eftir summarfrítíðina.

## Pan Fish stórt hall

Stóra norska alifyritøkan Pan Fish hevði í apríl ársfjórðingi 248 milliónir krónur í halli fyri skatt. Somu mánaðir í fjør hevði fyritøkan 304 milliónir krónur í avlopi.

Úrslitið í apríl ársfjórðingi ber í sær, at Pan Fish hevði 415 milliónir krónur í halli fyrra hálvár í ár ímóti 600 milliónum krónum í avlopi fyrra hálvár í 2001. Sjálvt rakstrarúrslitið fyri fyrra hálvár í ár var 190 milliónir krónur í halli, meðan tað sama tíðarskeið í fjør vísti 192 milliónir krónur í avlopi.

Pan Fish sigur, at felagið fer nú at hækka partapeningin við upp til 550 milliónum krónum. Tað er neyðugt, tí bankarnir Nen norske Bank og Nordea hava kravt størri eginpening í felagnum fyri at endurfíggja skuldina hjá felagnum.

## Løgreglan herjaði á flogfar

Belgiska løgreglan herjaði mánakvøldið á eitt flogfar, sum var á veg úr Paris til Oslo. Orsøkin var, at ein maður var vorðin frá sær sjálvum umborð á flogfarinum og kravdi at sleppa inn til flogskipararnar.

Flogskipararnir hildu seg ikki hava annað í at velja enn at neyðlenda í Bruxelles. Frammanundan hevði belgiska løgreglan fingið boð um, hvussu vorðið var, og alvápnaðir yvirgangsløgreglumenn stóðu til reiðar og tóku stutt eftir tann illa mannin.

Franska flogfelagið Air France átti flogfarið. Ein talsmaður hjá felagnum segði í gjár, at fleiri av ferðafólkunum vóru bangin, tí tey hugsaðu um tað, sum hendi í USA fyri skjótt einum ári síðani.

## Lógu deyðir í bilinum

Spanska løgreglan fann mánadagin líkini av fýra monnum í einum marokkanskum lastbili, sum var á veg til Fraklands.

Maðurin, sum koyrdi lastbilin, varnaðist brádliga óljóð í kølirúminum á lastini, og hann gjørdi tí av at steðga og at boða løgregluni frá. Tá løgreglumenninir kom á staðið, funnu teir fýra lík í kølirúminum.

Sponsku myndugleikarnir ivast ikki í, at teir fýra menninir høvdu ætlað sær til Fraklands, men enn vita myndugleikarnir ikki, hvørjum landi menninir vóru úr.

## Kanna tyrluvanlukku

Russisku myndugleikarnir siga, at alt ov nógv fólk vóru umborð á tyrluni, sum datt niður í Kekenia mánadagin. Tyrlan datt niður í eitt minuøki, og hildið verður, at meiri enn 100 fólk lótu lív.

Russiska hernaðartyrlan, sum er heimsins størsta tyrla, kann hava 80 fallskíggjahermenn ella 20 tons av farmi, men sambært russisku herleiðsluni er tað ikki óhugsandi, at 146 fólk vóru í tyrluni, sum datt niður. Í gjár ljóðaði úr Kekenia, at 27 fólk vóru sloppin frá vanlukkuni á lívi, og seinni segði ein kelda við tíðindastovurnar, at 105 fólk høvdu latið lív.

Russiska herleiðslan sigur, at annaðhvørt datt tyrlan niður, tí hon fekk trupulleikar við motorinum, ella vóru tað kekeniskir uppreistrarmenn, sum skutu hana niður við einari rakett.